ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Upptakt til ítróttin um vikuskiftið verður í blaðnum í morgin

Eingin endurtøka

Nú fyrsti finaluluttakarin er funnin, er greitt, at talan verður ikki um nakra endurtøku av finaludystinum seinasta ár. Í einum dysti, sum brádliga gjørdist meira spennandi enn líkt var til í hálvleikinum, eydnaðist tað loksins havnarliðnum at basa føroyameistarunum av Skála

Finnur Hansson tykist rættuliga at vera komin fyri seg á neistaliðnum, og hann var saman við Heina og Áka ein støðug hóttan móti StÍF verjuni

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

Neistin-StÍF 30-23 (17-9)

Tað var við stórum vónum, at farið varð oman í Ítróttarhøllina á Hálsi mikukvøldið, har lagt var upp til eitt brak av einum hondbóltsdysti, tá seinna hálvfinalan í steypakappingini millum Neistan og StÍF skuldi avgreiðast.

Eitt tað fyrsta ein legði til merkis, tá trinið varð inn í høllina var, at stórur munur er á, hvussu trúgvir áskoðararnir eru móti liði sínum.

Tvær vikur framman undan høvdu liðini bæði dystast á Skála, og tað ferðina kundu neistaáskoðararnir teljast á einari hond. Hesu ferð var høllin so at siga stúgvandi full, og ein heilt fittur partur av áskoðarunum vóru strandingar, sum høvdu lagt leiðina til Havnar, so karmarnir fyri einum spennandi og undirhaldandi dysti, vóru í øllum førum til staðar.

Fyrra hálvfinalan endaði sum kunnugt við eitt máls sigri til strandingar, tá teir fingu avgerandi máli við seinasta skotinum í dystinum, og havandi í huga at liðini høvdu leiktu javnt seinasta dystin teirra millum í grundspælinum, var tí øll orsøk til at vænta ein javnan og spennandi dyst.

Neistin eksploderaði

Hetta sá eisini út til at gerast veruleiki fyrstu løtuna av dystinum, men brádliga var tað sum neistaliðið eksploderaði. Ikki tí, tað er hent fyrr, men tá hevur tað ofta verið í stuttum løtum.

Hesu ferð vardi eksplosiónin í góðar 20 minuttir, og serliga vóru tað Heini, Áki og Finnur, sum gjørdu um seg, tá teir lyftu likamið frá gólvinum og lameteraðu bóltarnir fram við málverjanum hjá strandingum, líkamikið um hesin æt Johan ella Pól Jákup.

Samstundis riggaði verjuparturin á neistaliðnum sera væl, og komst hetta í stóran mun av, at Finnur nú bert verður nýttur í álopspartinum. Har er hann nevnliga ein sera týðningarmikil partur av liðnum, meðan tað ofta hevur gingist sera striltið hjá honum í verjupartinum.

Nú hevði venjarin valt, at lata løgtingsmannin hjá Neistanum avloysa Finn í verjupartinum, og hetta merkist í stóran mun. Harumframt eydnaðist tað eisini hjá Kára Mortensen at fremja eina sera offensiva dekking mótvegis John Petersen, sum als ikki slapp fram at skotmøguleikum, og við hesum var ein stórur partur av álopsvápninum hjá StÍF sett úr spælinum.

Alt í alt ein sera góður fyrri hálvleikur frá neistaliðnum, og í hálvleikinum mundu flestu áskoðararnir verða samdir um, at um liðið nú helt fast, átti finalusessurin at verið heima.

Sigurin kom í vanda

Neistaliðið byrjaði eisini seinna hálvleik á sama hátt, sum teir sleptu í fyrra. Tvey mál á rað syrgdu fyri eini 10 mála leiðslu, og strandingar tóktust alt meira mótfalnir.

Brádliga raknaðu teir tó við aftur, og spakuliga fóru teir at taka burtur av leiðsluni hjá Neistaliðnum. Í eini roynd at venda dystinum, valdu teir so at siga allan seinna hálvleik at mansverja Áka og Heina, og hetta tóktist í stóran mun at darva álopsspælinum hjá havnarliðnum. Tað var sum vistu leikararnir á heimaliðnum ikki, hvønn teir nú skuldu royna at spæla upp til skot, og flestu álopsroyndirnar endaðu við hálvhjartaðum einstaklingaroyndum. Tá teir so endiliga komu ígjøgnum strandaverjuna, stóð Johan sum ein múrur millum stengurnar.

John var nú eisini komin fyri seg, og helst mundi tað vera honum ein stór hjálp, at Alexandur nú var komin á veingin, so John sjálvur varð fluttur nærri miðjuni.

Frá støðuni 19-9 togaðu strandingar seg eftir 12 minuttum upp á 17-21, og brádliga var finalusessurin bert eini trý ella fýra mál burturi. Neistaleikararnir, og ikki minst —áskoðararnir, gjørdust alt meira tyngdir av nervum av gongdini, og fóru nú at hugsa um, hvørt tað veruliga skuldi eydnast StÍF at taka leiðsluna innaftur.

Framhaldandi vórðu Áki og Heini mansvardir, og tá tað eina ferð eydnaðist Áka at skræða seg leysan, var Artur sera heppin, tá hann bert fekk tveir fingrar frá dómarunum, tá hann heldur átti at fingið reyða kortið fyri at skumpa Áka, sum hevði beina kós móti málinum.

Ódnartakið hjá StÍF hevði tó helst kostað ov nógvar kreftir, tí um hálvan seinna hálvleik, byrjaði heimaliðið aftur at fáa glið á, og so við og við, fóru teir nú aftur frá Strandingunum.

Í álopspartinum funnu teir nú stevið aftur, og tá Bogi móti endanum kom á vøllin fyri Petur, stongdi hann málið í einar fimm minuttir, so sigurin ikki enn einaferð kom í vanda.

FM er framvegis eftir

Neistaliðið er sostatt til reiðar at leika finaludyst, meðan strandingar mugu ásanna, at hetta ikki skal gerast teirra lutur hetta kappingarárið.

Enn hava teir tó onga orsøk til at hanga við høvdinum, tí framvegis hava teir eitt FM-heitið at verja, tá hugsað verður um, hvussu liðið leikti seinasta ár eftir vónbrotið í finaludystinum, er als ikki óhugsandi, at teir enn einaferð reisa seg, og hevnað steypatapið í landskappingini.

Fyrsta møguleikan til hetta fáa teir, tá teir komandi sunnudag skulu til Vestmanna, og um tað eydnast teimum at skala oddaliðnum, munnu viðhaldsfólkini hjá Neistanum helst hava gloymt alt um, at Artur skuldi sæð reytt mikukvøldið.

Dysturin í tølum:
Málskjúttar:
Neistin: Heini Joensen 10 (2), Áki Olsen 6 (1), Finnur Hansson 5, Kári Mortensen 4, Jákup Sverri Kass 2, Karl Oddmar Rasmussen 1, Elmar Ósá 1, Áki Mørk 1
StÍF: John Petersen 9 (3), Jónleif Sólsker 4, Sveinbjørn Poulsen 3, Artur Johansen 2, Marius Joensen 2, Kartin Danielsen 2, Alexandur Johansen 1
Brotskøst:
Neistin 5, StÍF 3
Útvísingar:
Neistin 3, StÍF 5
Diskvalifikatión:
Neistin 1 (3x2 minuttir)
Dómarar úr Tjaldur:
Kári Hansen og Dánial Hansen

Henning á veg til Íslands

Íslendska felagið, Valur, hevur sýnt áhuga í føroyska landsliðsleikaranum

JÁKUP MØRK

Seinastu tíðina hevur tað verið alt meira vanligt, at útlendsk feløg sýna áhuga í føroyskum leikarum.

Eitt av teimum londum, har tað í dag eru flest føroyskir leikarar, er Ísland, og tykist møguleiki vera fyri, at enn ein føroyskur landsliðsleikari leitar norðureftir.

Talan er landsliðsleikaran, Henning Jarnsskor, sum helst man teljast millum teirra, sum kann røkja flestar uppgávur á vøllinum.

Hóast hann mest hevur verið nýttur sum vongverji á landsliðnum, hevur hann í felagshøpi røkt ymisk pláss. Sostatt hevur hann røkt flestu plássini á miðvøllinum, umframt at hann eisini hevur leikt fleiri dystir í álopinum, har hann eisini hevur sýnt gott máltev.

Sjálvur sigur Henning, at enn er langt á mál í hesum sambandi, men hann váttar tó fyri Sosialinum, at Íslendingar hava verið í sambandi við seg, og venda teir væntandi aftur í komandi viku.

Sáttmálabundin

Henning leggur tó dent á, at hann framvegis er bundin at sáttmála við GÍ, og at hann tískil ikki er fullvísur í, júst hvussu landið liggur. Hann sigur tó, at hann sjálvandi er áhugaður at fara, um tað nú kemur somikið langt.

Petur Holm, sum umboðar GÍ í slíkum málum, sigur fyri Sosialinum, at enn er langt á mál hesum viðvíkjandi.

Við tíðini hava vit verið ígjøgnum hetta fleiri ferðir, og fyrr eru vit ofta komnir longri í samráðingunum, uttan at nakað úrslit hevur spurst burtur úr.

Hann váttar tó, eins og Henning, at Íslendska liðið hevur sett seg í samband við GÍ, og at teir væntandi venda aftur til málið í komandi viku.

Herfølge hevur fingið ein nýggjan málverja

Teir rokna við møguleikanum, at Jákup Mikkelsen fer at verða seldur til útlandið

Leiðslan í Herfølge hevur nú gjørt av at keypa nýggjan málverja, tí ikki er væntandi, at Jákup Mikkelsen verður verandi í felagnum

Í síðstu viku savnaði John Faxe Jensen Jákup Mikkelsen og hinar spælararnar á oddaliðnum í superliguni til fyrstu venjingina í ár. Málið er at verja tryggga oddasessin so leingi, sum tað ber til. Tað verður strevið, og longu í teimum báðu fyrstu umførunum fer nógv at standa á. Grækarismessudag, sunnudagin 12. mars, skal Herfølge spæla á útivølli í Lyngby, og sunnudagin 19. mars fáa teir vitjan av Brøndby. 18 av 33 umførum eru farin afturum. Herfølge hevur 37 stig, og Brøndby, sum er á øðrum plássi, hevur 31 stig. Silkeborg og Lyngby hava 29 stig.

Nýggj nøvn

Millum spælararnar, sum fóru undir venjingina í Herfølge í síðstu viku, vóru onkrir, sum ikki vóru har, tá danska fótbóltskappingin eftir fyrsta sunnudagin í adventini fór í vetrarfrí. Chris Hermansen, málsókni álopsmaðurin, er komin aftur úr útlegdini í AB, har hann hevur verið í tvey ár, og so hevur Jákup Mikkelsen fingið ein kappingarneyta:

– Tað liggur í luftini, at Jákup Mikkelsen skal verða seldur til útlandið. Vit hava einki ítøkiligt tilboð upp á hann akkurát nú, men vit eru noyddir at leggja uppfyri tí møguleikanum, tá vit leggja til rættis, segði John Faxe Jensen við Politiken fyrr í vikuni. At Jákup Mikkelsen framvegis er ivaleysa fyrsta valið ímillum stólparnar hjá Herfølge er kortini einki at ivast í.

Nýggi málverjin eitur Nicolas Abbot. Hann er 22 ára gamal, og hann er amerikumaður. Hann er komin til Danmarkar í lestrarørindum, og Herfølge hevur mett hann at vera so mikið stinnan, at teir rokna hann sum møguligan avloysara hjá føroyska landsliðsmálverjanum.

Í fyrstu atløgu venja teir í Herfølge heima í Danmark, men seinni fara teir til Spania. Leiðin gongur til La Manga, har teir umframt at venja skulu taka lut í norðurlendskari kapping í tíðarskeiðnum 19. til 26. februar.

John Faxe Jensen hevur gjørt avtalur um venjingardystir í Keypmannahavnarøkinum. Teir vera ímóti Frem, B93, Køge og Hvidovre, sum øll spæla í næstbestu deildini.

Størri heimildir

Í dag skal John Faxe Jensen til samráðingar við leiðsluna í Herfølge. Tá Kenneth Wegner í heyst fekk sekkin sum ítróttarstjóri dittaðu vit okkum at gita, at tað kundi hugsast, at John Faxe Jensen fór at fáa leiklutin sum venjari og stjóri, akkurát sum tað er kent frá t.d. eingilsku fótbólti.

Í síðstu viku vistu danskir fjølmiðlar at siga, at akkurát hetta er á skránni, tá leiðslan í felagnum og venjarin skulu hittast í dag.

Kenneth Wegner tóktist ikki so hugaður í at arbeiða fyri, at Jákup Mikkelsen varð seldur av landinum, sum John Faxe Jensen hevur tykist vera. Tískil kann tað fara at vísa seg at vera ein fyrimunur fyri føroyska málverjan, at venjarin nú kanska fer at taka sær av keyp og sølu av spælarum.

JH

Niclas Eysturoy megnaði, umframt at vinna kappingina hjá dreingjum 10-12 ár, at leika seg í finaluna í dreingjum 12-14 ár

Mynd: Álvur Haraldsen

Úrslitini úr Tórshavn Open

Stór badminton kapping var í Havn seinasta vikuskifti

JÁKUP MØRK

Seinasta vikuskifti varð stór badmintonkapping hildin í Badmintonhøllini í Havn, har leikarar úr øllum landinum høvdu høvi at royna seg.

Dystast varð í einmansleiki í øllum deildum, og leikararnir drivu á, so at siga alt vikuskiftið.

Byrjað varð leygarmorgunin, og seinasti vinnarin varð ikki funnin, fyrr enn Erland Jacobsn seinnapartin sunnudag, hevði bast Heðini Jacobsen, tá hesir báðir hittust í finaluni hjá monnunum.

Sum vera man, so var spenningurin stórur í fleiri av deildunum, tí nogvir leikarunum vóru sera javnir.

Tvey heiðursmerki

Hjá monnunum mundi mest óvæntaða úrslitið vera, at Heðin megnaði at leika seg í finaluna, hóast hann á vegnum mátti dystast móti Regini Hammer, sum framman undan var styrkismettur sum nr. 2.

Eisini hjá teimum yngru vóru onkur óvæntað úrslit, og serliga var tað merkisvert, at Niclas Eysturoy megnaði at vinna sær tvey heiðursmerki.

Hann vann nevnliga kappingina í sínum bólki, dreingir 10-12 ár, og aftur fyri slapp hann so at luttaka í dreingir 12-14 ár. Her megnaði hann eisini at leika seg fram til finaluna, men mátti hann tá koritni lúta fyri Thomas Rubbeksen, sum vísti seg at verða ein ov stórur biti.

Hjá kvinnunum var eisini sera stórur spenningur undan kappingini.

Kanska var luttakaratalið, fýra, í so lágt, men talan var um fýra sera javnar leikarar.

Endin var tó, at Elin Elin Jacobsen og Guri Poulsen skuldu leika avgerandi dystin, og her eydnaðist tað Elin at vinna í trimum settum.

Úrslitini í ymsu deildunum vórðu annars hesi:

Gentur 10 ár:
1. Brynhild Carlsson
2. Agnas Olsen

Gentur 10-12 ár:
1. Christina Eriksen
2. Ulla í Dávastovu

Gentur 12-14 ár:
Malan Simonsen
Mia Mortensen

Gentur 14-16 ár:
1. Elin Hansen
2. Guðrun Poulsen

Kvinnuunglingar:
1. Karin Hansen
2. Elin Hansen

Dreingir 10 ár:
1. Reidar Luid
2. Magnus á Rógvu

Dreingir 10-12 ár:
1. Niclas Eysturoy
2. Hilmar Kass Jacobsen

Dreingir 12-14 ár:
1. Thomas Rubeksen
2. Niclas Eysturoy

Dreingir 14-16 ár:
1. Bjartur Lamhauge
2. Jonhard Hansen

Mansunglingar:
1. Aksel Poulsen
2. Bjartur Lamhauge

Kvinnur:
1. Elin Jacobsen
2. Guri Poulsen

Menn
1. Erland Poulsen
2. Heðin Joensen

Stórur áhugi fyri at læra av norðmonnum

Fleiri enn 30 venjarar fara at taka lut í skeiðinum í vikuskiftinum. FSF vil hava ábyrgdarpersónar í feløgunum at møta upp í kvøld

Í kvøld verður farið undir fyrsta fótbóltsvenjaraskeiðið í hesum árinum. Tað er Björn Hansen, sum er í fulltíðarstarvi hjá best kenda fótbóltsfelagnum í Norðurlondum, Rosenborg, sum er skeiðhaldari. Skeiðið verður í hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Runavík, og áhugin er stórur. Fleiri enn tríati venjarar hava boðað frá, at teir fara at taka lut í skeiðnum, sum byrjar í kvøld klokkan 20 og sum endar seinnapartin í morgin klokkan 16.30.

Greiðir frá Rosenborg

Björn Hansen hevur arbeitt í Rosenborg í fleiri ár. Fram til á nýggjárinum var hann eisini venjari hjá norska U-21 landsliðnum, men nú er hann í fulltíðarstarvi hjá Rosenborg sum talentvenjari.

Alla staðni í Norðureuropa kaga teir til Rosenborg fyri at frætta, hvat býr aftanfyri framúr góðu gongdina hjá besta liðnum. Í oktober vóru Jógvan Martin Olsen, Jákup Simonsen og Jóhan Nielsen og vitjaðu í felagnum í nakrar dagar, og nú fáa føroyskir venjarar høvi at hoyra meiri um Rosenborg:

– Men vit vilja fegnir eisini geva nevndarlimum og øðrum ábyrgdarpersónum í feløgunum høvi at hoyra Björn Hansen róða um tað, sum hevur við felagið at gera, og sum ikki snýr seg beinleiðis um bóltspælið. Í kvøld klokkan átta fer hann at tosa um bygnaðin í felagnum og hugsjónina aftanfyri felagið. Hetta er nakað, sum vit halda, at tað eigur at vera áhugi fyri hjá øðrum enn teimum, sum eru venjarar, og tí er tað, at vit bjóða omanfyri nevndu at vera vælkomnum tann fyrsta tíman í kvøld, sigur Jógvan Martin Olsen, sum hevur ábyrgdina fyri yngru landsliðunum.

Seinni í kvøld fer venjarin at greiða frá spælistílinum, sum Rosenborg venur og nýtir í dystum, og tað prátið og alt tað, sum fer at ganga fyri seg leygardagin, er mest ætlað venjarunum, sum fara at taka lut í skeiðnum.

Fyrrapartin í morgin fer skráin at snúgva seg um venjingina í Rosenborg, og seinnapartin verður farið á vøllin úti við Løkin, har spælarar úr NSÍ fara at verða partur í venjingini. Skeiðið verður liðugt klokkan 16.30 í morgin.

JH